MENTAMÁLARÁÐIÐ

# Starvsfólk til Próvstovuna

**Starvið**
Eitt áhugavert og fjølbroytt starv sum málsviðgeri er leyst at søkja á Próvstovuni.

Próvstovan hevur ábyrgdina av at skipa fyri og leggja til rættis próvtøkur í fólkaskúla-, miðnáms- og hægri skúlum.

**Arbeiðið fevnir m.a. um at:**
- Seta uppgávunevndir og samskifta við tær um at gera, prenta og senda út próvtøku-uppgávur til skúlarnar
- Málsviðgera
- Samskipa og fyrireika ymiskar arbeiðs-uppgávur á Próvstovuni – innstilling til próvtøku, skemalegging, tekstuppgeving o.a.
- Saman við uppgávunevndum o.ø., gera próvtøkuuppgávur klárar til prentingar, skriva tekstir, gera uppseting (lay-out) o.a.
- Prenta, pakka og senda próvtøkuuppgávur til allar skúlar í skúlaverkinum
- Umsita virkisøki, sum verða løgd til próv-stovuna, t.d. samskifti við próvdómarar o.o.
- Avgreiða samsýning í sambandi við próvtøkur.

**Førleikakrøv**
Vit vænta okkum m.a., at umsøkjarin hevur:
- Útbúgving og/ella royndir í skrivstovu-yrkinum ella øðrum, ið kann javnmetast við hetta
- Góðan kunnleika í nýtslu av edv, eitt nú word, excel, access, power point, indesign og photo shop.
- Góðan kunnleika til føroyskt
- Góð samstarvsevni
- Dugir at arbeiða sjálvstøðugt og at arbeiða undir tíðartrýsti.

**Vit bjóða**
- Starvið er spennandi við nógvum skiftandi uppgávum og við nógvum samskifti inn- og úteftir
- Tað er eitt sjálvstøðugt starv við møguleikum fyri bæði persónligari og fakligari menning
- Tú kemur at arbeiða í einum spennandi umhvørvi við skiftandi uppgávum innan undirvísing og mentan.

**Setanar- og lønartreytir**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið í lønarflokki 3.

Viðmerkjast skal, at setanarøkið fevnir um alt aðalráðið og allar deildir/stovnar tess.

**Umsókn**
Umsókn við prógvum o.ø. skulu sendast til: Mentamálaráðið, Postrúm 3279, 110 Tórshavn, ella sum teldupost til mmr@mmr.fo

**Umsóknarfreist**
Umsóknin skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 12. juli 2010, kl. 16.00. Starvið verður at seta skjótast til ber.

Meira fæst at vita við at ringja til Bjarna Wilhelm, deildarstjóra í Mentamálaráðnum, tlf. 306522 ella 555022.

Mentamálaráðið fyrisitur málsøkini útbúgving, gransking og mentan, og herundir eisini dagstovnaøki, kirkjumál og ítrótt. Mentamálaráðið er bygnaðarliga skipað við 4 deildum – fólkaskúladeild, vinnu- og miðnámsskúladeild, mentamáladeild og fyrisitingardeild. Próvstovan er partur av fyrisitingardeildini í Mentamálaráðnum.

**Hoyvíksvegur 72 · Postrúm 3279 · FO-110 Tórshavn**
**Tel. 30 65 00 · Faks 30 65 55 · mmr@mmr.fo**

# Trolbátur til sølu



Við hesum verður trolbáturin Sigrun lýstur til sølu. BRT 158,90 og NRT 47,60. L. 22,230 m, B. 6,800 m og D 4,140 m. Trolbáturin er bygdur í 1984 í Fraklandi. Motorur mrk. Mitsubishi.

Hann hevur fiskiloyvi í bólki 4T og hevur í fiskiárinum 2009/2010 fingið tillutað 120,57 fiskidagar.

Selt verður um nøktandi boð fæst. Áhugað kunna venda sær til Inga Højgaard, advokat, ih@lawfirm.fo. Trolbáturin kann síggjast eftir nærri avtalu.

ADVOKATFELAGIÐ VIÐ STROND 4
YVIRI VIÐ STROND 4 · TEL 311260 · FAX 311261 · P.O. BOX 359
FO-110 TÓRSHAVN · FAROE ISLANDS
EMAIL: LAWFIRM@LAWFIRM.FO
**HEIMASÍÐA: WWW.LAWFIRM.FO**

JÓGVAN PÁLL LASSEN · PETUR EVEN DJURHUUS
JÓGVAN E. ELLEFSEN · ANNA DAM · INGI HØJGAARD
GUNN ELLEFSEN · MIMI STEINTÓRSDÓTTIR

# Goymslufólk til Nordcar

Søkt verður eftir leiðara til eykaluta-goymslu okkara at byrja skjótast gjørligt.

**Vit leita eftir einum persóni, sum**
- er røkin
- er kundavinarligaur
- hevur telduførleika á rímiligun støði
- hevur koyrikort

Um tú hevur royndir frá líknandi arbeiði, er hetta ein fyrimunur. Hetta er tó eingin treyt.

Nordcar varð stovnað í 2004 við sølu av BMW og Fiat bilum fyri eyga.

Vit eru ein av teim minnu bilasølunum í Føroyum og rokanst skal tí við, at tú eisini kemur at luttaka í øðrum arbeiði enn á goymsluni, t.d. móttøku av kundum til verkstaðið o.a.

Tí verður stórur dentur lagdur á gott samarbeiði og góða kundatænastu.

Lønar- og setanraviðurskifti verða eftir nærri avtalu, og í mun til útbugving og royndir.

Meira fæst at vita við at ringja til Jens Petur Jensen á tlf. 22 80 90 ella t-posti jpj@nordcar.fo

Umsóknir við viðkomandi skjølum skulu verða okkum í hendi í seinasta lagi tann 1. juli 2010.



**nordcar**
Smiðjugerði 4 · Postsmoga 1331
110 Tórshavn · Tel 30 80 80
nordcar@nordcar.fo · www.nordcar.fo



# Summarhús á Viðareiði til sølu

**Úr stovuglugganum er panorama-útsýni yvir allar 6 norðuroyggjar**

Um hóskandi boð fæst er ogn okkara uppi við Garð til sølu. Talan er um trý matr. nevniliga nr. 157, 158 og 177, sum eru ávikavist 1.570 m², 1.025 m² og 1.365 m² ella tilsamans uml. 4.000 m².

Húsini á Garðsvegi 48 á Viðareiði eru bygd á matr. nr. 157 sum summarhús, og er helst norðastu skrásettu hús í Føroyum. Útsýnið er avbera gott yvir Viðareiðis bygd og norðoyggjarnar bæði eystanfyri og vestanfyri. Húsini eru 7x8 metur til støddar við kjallara. Húsini eru bygd í 1970 úr viði við stoyptum kjallara. Eru í ár 2009 umvæld við nýggjum vindeygum og nýggjum klædningi á suður- og eystursíðuni.

Í ovaru hæddini er stova, køkur, 2 sovirúm og hems. Í kjallaranum er innrættað baðirúm við brúsu, vaskirúmi og eitt stórt rúm (stova/kamar).

Ravmagn og vatn er lagt inn í húsið. Húsini hava brenniovn til upphitan, umframt el-ovnar eftir tørvi.

**Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til tlf. 565767 ella 582037.**

RUNAVÍKAR KOMMUNA

# Reingerð av dagstovnunum á Skála og í Søldarfirði

Biðið verður um tilboð uppá reingerð av dagstovnunum á Skála og í Søldarfirðið. Stovnarnir lata upp 16. august 2010.

Nærri uppplýsingar um reingerðina kunnu fáast við at venda sær til Dinnu Jensen, býráðsskrivara ella Jákup H. Foldbo, sosialdeildarleiðara á tlf. 417000

Skrivlig tilboð skulu verða kommununi í hendi í seinasta lagið 01.07.2010 kl. 12:00

Kommunan skilar sær rætt til at velja ímillum tey innkomnu tilboðini, ella einki at taka.

**Runavíkar kommuna**
Heiðavegur 26 · Postsmoga 139 · FO-600 Saltangar